# nýggjari útbjóðing



*Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi hevur vónir um, at fleiri nýggj oljufeløg kunnu koma uppí leitingina á landgrunninum, tá enn ein útbjóðing letur upp í heyst.*

øðrum kanningum, sum eru gjørd í 90-unum og fyrst í ár 2000 – data, sum ikki longur eru fevnd av lógini um tagnaðarskyldu. Talan er nevniliga um stórar mongdir av data, sum nú eru frítt tilgongilig hjá øðrum. Sosialurin skilur frá keldum í oljuídnaðinum, at feløg, sum møguliga liggja framvið og hava áhuga fyri eini komandi útbjóðing kunnu vera onkur av teimum heilt stóru so sum ExxonMobile og Total. Bæði hesi feløgini eru virkin eystan fyri markið, og tað hevur eisini ljóðað, at tey hava víst áhuga fyri at keypa seg inn í nøkur av verandi loyvum á landgrunninum.

### Ikki stórar broytingar í loyvistreytum

Nú nýggj útbjóðing stendur fyri framman er kortini ikki ætlanin at gera stórvegis broytingar í sjálvum loyvistreytunum. Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tey fara ikki at broyta treytirnar, sum fylgja við loyvunum, stórvegis, tí tær eru góðar sum er. Tær broytingar, sum ætlanin er at gera, eru meira praktiskar fyri at gera arbeiðið hjá oljufeløgunum meira smidligt. Onkrar justeringar verða so gjørdar.

kann sammetast við tann áhuga, sum var undan 1. útbjóðing. Men eftir tað, sum er hent frá 2001 til 2003, so haldi eg tað gongur tann rætta vegin aftur, eisini um vit taka Brugdubrunnin hjá Statoil við. Tað vistu vit øll var ein sera váðilig boring, men hóast vit ikki gjørdu eitt oljufund, so fingu vit sera týðandi upplýsingar og vitan frá tí boringini, sum kann koma at stuðla uppundir framtíðar leiting sigur Sigurð í Jákupsstovu.

Samanumtikið er hann bjartskygdur. Nú ræður um at fáa so nógva nýggja vitan sum gjørligt um okkara undirgrund, samtíðis sum vit øll seta okkara álit á tað góða arbeiðið, sum verður gjørt eystan fyri markið.

## Fylgja gongdini eystan fyri markið

– Vit fylgja sjálvandi við, hvat hendir hinumegin markið, og tað er greitt, at spurningarnir, sum hava verið frammi í miðlunum í seinastuni, har ein infrastrukturur til gassútbyggingar er eitt av uppskotunum, hava okkara stóra áhuga sigur Sigurð í Jákupsstovu, í eini viðmerking til tíðindini um, at bretska stjórnin saman við fleiri stórum oljufeløgum, er í ferð við at leggja eina ætlan fyri framtíðar útbyggingar.

Sigurð í Jákupsstovu vísir á, at fyri framtíðar olju- og gassfund í Føroyum, er tað av alstórum týdningi, at tað longu finst ein útflutningsleið til gass. Hóast vit gera oljufund, so vil tað altíð vera gass til steðar eisini, og kunnu vit ikki sleppa av við gassið gjøgnum eina gassleiðingsskipan, so eru vit noydd til at spræna gassið niður aftur í undirgrundina, og tað kann hava nógvar útreiðslur við sær sigur Jarðfeingisstjórin og vísir á, at tað er ikki loyvt at koyra gassið út í luftina. Samanumtikið heldur Sigurð í Jákupsstovu, at ein útbygging í bretskum øki av infrakervi til m.a. gass bøtir um støðuna hjá okkum hyggja vit longur fram í tíðina.